# Tað praktiska mótvegis prinsippum

**Anfinn Kallsberg vísti á ta praktisku nyttu, hesar lógirnar hava, og Høgni Hoydal ávaraði hinvegin ímóti, at tá virðir og visjónir mugu víkja fyri »praktiskum loysnum« er fólkaræðið í vanda**

YVIRTØKU- OG HEIMILDARLÓGIRNAR

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*



*Anders Fogh Rasmussen skrivar í lesarabrævi í dag, at tann nýggja skipanin, sum nú verður innførd, byggir á eina avtalu millum Føroya Landsstýri og donsku stjórnina sum »ligeværdige parter«*

Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg fóru aftur í klórnar á hvørjum øðrum undir 3. viðgerð av yvirtøku- og heimildarlógini

Anfinn Kallsberg lýsti støðuna soleiðis, at Høgni Hoydal bert kjakast út frá nøkrum teoretiskum prinsippum, sum ikki føra nakran veg, meðan hann sjálvur tók útgangsstøði í, hvat praktiskt er møguligt í hesi støðu.

– Tað er ein fyrimunur hjá Høgna Hoydal, at hesi mál ikki verða avgreidd, tí at so kann hann halda fram við tí stríði, sum hann hevur ført seinastu árini, segði Anfinn Kallsberg.

Høgni Hoydal vísti til fyrrverandi svenska forsætisráðharran, Olof Palme, ið segði, at so skjótt sum tær sokallaðu praktisku loysnirnar vinna á øllum visjónum og virðum á tí politiska pallinum, er tað eitt álvarsamt sjúkueyðkenni í fólkaræðinum.

### Líkist gomlu yvirtøkulógini

Anfinn Kallsberg vísti á, at hendan yvirtøkulógin líkist nógv tí yvirtøkulóg, sum Høgni og Anfinn vóru samdir um undir tí seinnu sjálvstýrissamgonguni.

– Hetta er einasti praktiski vegurin ímóti størri sjálvstýri, og tað er við at tøma heimastýrislógina, segði Anfinn Kallsberg á Fólkatingsins røðarapalli. Tí skilir hann ikki, hví Høgni Hoydal ikki kundi taka undir við hesi lógini.

– Mangt skal man hoyra, áðrenn av dettur oyrað. Og nú skal eg ansa eftir ikki at gerast illur, var svarið hjá Høgna.

– Hesar lógirnar eru eitt tómt skal við tí endamáli at innibyrgja okkara sjálvstýri enn meira. Yvirtøkurnar verða ikki framdar, og tá er einki vunnið, segði Høgni Hoydal og legði eisini Anfinn undir at hava hálsað um í síni støðu til ríkisfelagsskapin síðan sjálvstýrissamgongan var í velmaktini.

### Lesarabræv frá Fogh

Á síðu 10 í dagsins blað hevur danski forsætisráðharrin eitt lesarabræv, har hann dregur saman um gongdina og ætlanina við hesum báðum lógunum.

Hóast Fogh hevur verið upptikin á ES-toppfundi, hevur hann funnið tíð til at skriva lesarabrævið í sambandi við yvirtøku- og heimildarlóginar.

– Den nye ordning, som vi nu indfører, bygger på en overenskomst mellem Færøernes landsstyre og den danske regering som ligeværdige parter, sigur forsætisráðharrin í brævinum.

Hendan definitiónin av »ligeværdige parter« umfatar tó ikki uttanríkismál, tí sum forsætisráðharrin sigur í svari til politiskubúskaparligu nevndina í Fólkatinginum, at »lovforslaget bygger således ikke… på en ligestilling mellem regeringen og landsstyret i udenrigspolitiske anliggender«.

Orðið »ligeværdighed« merkir sostatt ikki tað sama sum orðið »ligestilling«.

Forsætisráðharrin sigur víðari, at avtalan byggir á ta felagsyvirlýsing, sum forsætisráðharrin og løgmaður undirskrivaðu tann 5. apríl.

## Lógirnar samtyktar

**Eftir viðgerð í hálvanannan tíma vórðu yvirtøku- og uttanríkispolitisku heimildarlógirnar samtyktar á Fólkatingi**

YVIRTØKU- OG HEIMILDARLÓGIRNAR

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Fríggjamorgunin klokkan tjúgu minuttir í tíggju vórðu yvirtøku- og heimildarlógirnar endaliga samtyktar á Fólkatingi. Stórur meiriluti var fyri uppskotinum, tá tað kom atkvøðugreiðslu.

Allir teir stóru flokkarnir høvdu framman undan boðað frá, at teir tóku undir við uppskotinum. Einasti veruligi mótstøðumaður ímóti lógunum, sum gjørdi vart við seg fríggjamorgunin, var Høgni Hoydal, og hann gjørdi eisini vart við sína ónøgd við 3. viðgerð.

Eindarlistin gav til kennar, at flokkurin var ivingarsamur mótvegis lógunum og gjørdi eisini vart við, at hann ikki tók undir við støðuni hjá forsætisráðharranum viðvíkjandi støðuni hjá tí danska málinum. Frank Aaen helt, at hetta var ikki nakað hjá tí danska Fólkatinginum at taka støðu til, men at hetta málið hoyrdi heima í Føroyum.

»Forslaget er vedtaget og bliver sendt til statsministeren", segði tingformaðurin í Fólkatinginum at enda, og nú eru tær báðar umstríddu lógirnar bæði samtyktar á løgtingi og á fólkatingi.

Norsk hjún í Føroyum:

# Faðir hennara bjargaði ungum føroyingum í havsneyð

**Norsku hjúnini John og Hilde Edelston eru komin til Føroya og vilja fegin hava samband við tveir føroyingar, ið vórðu bjargaði av norska bátinum Dragholm í 1967**

NORSK HJÚN

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*



*Hilde Edelston (fødd Sundgot) saman við manninum John Edelston. Tey vilja fegin koma í samband við tveir mans (allarhelst suðringar), sum vórðu tiknir upp av einum norskum fiskiskipi í 1967*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Fyrst í juni mánað í 1967 vóru tveir unglingar farnir at skjóta álku. Teir fóru úr Trongisvági, men komnir út á hav fingu teir motorsteðg, og streymurin tók teir til havs. Fólk í Trongisvági gjørdust bangin, tá menninir ikki komu aftur til lands, og ein leiting var tí sett í verk.

Norska fiskiskipið Dragholm var komin inn á Trongisvág at bunkra, og báturin var tí við í leitingini eftir teimum báðum monnunum, sum vóru í einum opnum báti.

Manningin á Dragholm sá tá eitt veikt ljós í havsbrúnni. Nátt var, og tí sóu menn ljósið. Tá høvdu menninir umborð á tí lítla bátinum tikið eina skipstroyggju, stoytt bensin á hana og fest í. Vónin var sjálvandi, at fólk skuldu varnast hetta neyðarkall, og tað eydnaðist.

### Vilja hava samband við menninar

Skrivað er um hendingina í einum norskum blaði. Norsku hjúnini John og Hilde Edelston eru nú komin til Føroya og vilja fegin hava samband við teir unglingarnar, sum vóru umborð á bátinum hesa náttina í juni 1967. Teir vóru tá 16 og 21 ára gamlir.

Faðir Hilde Edelston, ið æt Henry Sundgot, átti bátin og var eisini við hendan túrin. Skipari hendan túrin var Harald Fiskerstrand. Henry Sundgot vitjaði ofta í Føroyum sum sjómaður.

Hilde Edelston greiðir frá, at hon og maðurin hava verið á Landsbókasavninum og kanna, um hendingin er umrødd í teimum føroysku bløðunum, men tey hava einki funnið hesum viðvíkjandi. Tí venda tey sær til Sosialin at fáa hjálp.

– Beiggi mín fann greinina um hesa hendingina, tá hann ruddaði umborð á bátinum hjá pápa. Vit hava goymt greinina, og nú tá vit eru í Føroyum vilja vit fegin fáa meira at vita um hetta, sigur Hilde Edelston.

Tey bæði komu til Føroya hósdagin og fara heimaftur mánadagin seinnapart. Um onkur veit um hendingina at siga, kann hann venda sær til hjúnini á tlf. 0047 91155485.